# Øll hava tørv á at menna seg

**Skeiðstovan Kvæsir hevur í nøkur ár skipað fyri skeiðum av ymsum slagi. Tað hevur verið alt frá KT trygd til sølu og management. Nú fer skeiðstovan undir eina nýggja herferð, har skeiðini verða skipað undir heitinum Trivnaður og umhvørvi á arbeiðsplássinum**

SKEIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Í døgunum 8. til 12. november skipar skeiðstovan Kvasir fyri fimm ymiskum skeiðum undir felagsheitinum Trivnaður og umhvørvi á arbeiðsplássinum. Tey fimm skeiðini eru: Sjúkrafrávera – spill av góðum arbeiðskreftum, Ergonomiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvi, Psykiskt arbeiðsumhvørvi og organistiónsmenning og At skilja og loysa konfliktir. Umframt hetta verður ein temadagur, har ljós verður varpað á Heilsubetran á arbeiðsplássinum.

– Vit trúgva uppá, at øll menniskju hava tørv á at menna seg á ein ella annan hátt á onkrum støði, og er tað málið hjá okkum at nøkta tann tørvin, sigur Sam Jakobsen, dagligur leiðari á Kvasir.

Hesi skeiðini venda sær til ávísar málbólkar, tað veri seg leiðarar, stjórar ella fólk, ið til dømis arbeiða innan sjúkrafráveru og so framvegis.

Sam Jakobsen heldur, at tilvitanin hjá fólki um góða heilsu er og hevur verið á veg upp eftir í eina tíð. Eisini vísir hann á, at almanna- og heilsumálaráðharrin hevur sett fokus á heilsuna við millum annað renningini, sum var herfyri. Tí heldur hann, at hesi skeiðini eru løgd til rætta tíð og fara at raka væl.

– Eg trúgvi, at tann føroyski lønmóttakarin framyvir ikki bara fer at hugsa um pengar, tá hann skal finna sær eitt arbeiði. Trivnaðurin man eisini hava nógv at siga, sigur Sam og heldur fram, at tað helst verður tað sama við stjórum. At teir fara at raðfesta trivnaðin høgt fyri at halda upp á starvsfólkini

### Byrjaði við koyrikortinum

Kvasir sá dagsins ljós í 2000. Sam Jakobsen, dagligi leiðarin, var við til at byrja hesa skeiðstovuna, sum er ein sjálvstøðug eind undir Faroe Dane.

Hann greiðir frá, at tá sølan av teldum fekk luft undir veingirnar fyri nøkrum árum síðani, vaks tørvurin á at kunna menna seg innan teldunýtslu samsvarandi.

– Hetta gjørdi, at vit millum annað byrjaðu við teldukoyrikortinum, sum var okkara fyrsta skeið, greiðir Sam frá.

Síðani tað hevur Kvasir skipað fyri einum ótali av skeiðum. Við bæði føroyskum og donskum skeiðsluttakarum.

Á skeiðstovuni Kvasir arbeiða trý fólk fast, og so eru nógvir free-lance undirvísarar knýttir at stovuni eisini.



*Sam Jakobsen, dagligur leiðari, var við til at starta skeiðstovuna Kvasir upp fyri umleið fýra árum síðani*
*Mynd: Jens K. Vang*




Bilar
Nr. 186 • hósdagur • 30. september 2004 • 78. árg.

Toyota Corolla 1,6 VVT-i:

# Nýggjur komfortabul Corolla

**Toyota Corolla er nú komin við eini "facelift" við t.d. nýggjum kølaragittari, forlyktum og kúfangarum. Eisini innan eru fleiri broytingar, og bilurin er betur ljóðdoyvdur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kappingin um kundarnar er hørð í sokallaða Golf-klassanum, og allir bilframleiðararnir mugu fylgja við í menningini av nýggjum útgávum.

Toyota Corolla er nú komin við eini "facelift", har størsta broytingin at síggja til er, at hann nú líkjast nýggja Corolla Verso framman. Bilurin hevur fingið nýtt kølaragittar, forlyktir og kúfangarar.

Innan eru eisini fleiri broytingar, sum t.d. at rattið nú er "multijusterbart", hiti er í setrunum og nýggj optitron-instrumentir. Eisini er bilurin betur ljóðdoyvdur í kabinuni.

Trygdin er eisini betri, t.d. er ESP, ella VSC sum Toyota nevna skipanina, nú standard. Skipanin rættar bilin upp, um hann t.d. glíður út í svingum. Nakkastútturnar eru aktivar og antispinn og bremsuassistentur eru standard.

Tríggir bensin og tveir dieselmotorar eru at velja ímillum. Bensinmotorarnir eru:

1,4 VVT-i við 97 hk, 1,6 VVT-i við 110 hk, og 1,8 VVT-i T-Sport við 192 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,4 D-4D við 90 hk, og 2,0 D-4D við 116 hk.

Corolla fæst í útgavunum Linea Terra, Linea Luna og Linea Sol. Linea Terra er standard útgávan. Í útgávuni, Linea Luna, er bilurin útgjørdur við t.d. tokulyktum, stilling av radio v.m. í rattinum, leður girknøtti og kolfipur-styling í kabinuni. Í luksusútgávuni, Linea Sol, hevur hann t.d. leðurratt, automatiskt aircondition, regnsensorar og alu-styling í kabinuni.

Prísirnir byrja við 196.600 fyri ein 1,4 Linea Terra við trimum hurðum.



*Toyota Corolla líkjast nú Corolla Verso framman við t.d. nýggjum kølaragittari, kúfangara og lyktum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Corolla fæst í útgavunum Linea Terra, Luna og Sol*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Innan eru eisini fleiri broytingar við t.d. nýggjum optitron-instrumentum. Eisini er bilurin betur ljóðdoyvdur í kabinuni.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Toyota Corolla 1,6 VVT-i

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur VVT-i bensin við 110 hk |
| 0-100 km/t: | 10,2 sek |
| Bensinnýtsla: | 13,9 km/l |
| Dekkstødd: | 195/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 418,0 cm |
| Breidd | 171,5 cm |
| Hædd | 147,5 cm |
| Eginvekt | 1.125 kg |
| Viðførisrúm | 310 litrar |
| Prísur: | kr. 207.600 (Linea Terra 1,6 5/h) |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel 353040<br>www.reyniservice.fo |

### Sjey nýggir Hyundai



Suðurkoreansku Hyundai koma á marknaðin við ikki minni enn sjey nýggjum modellum næstu tvey árini. Fleiri av nýggjheitunum koma eisini til Evropa.
*Kelda: Motor Magasinet*

### Daewoo blíva til Chevrolet



Tíðindini um at Daewoo bilarnir skifta navn til Chevrolet 1. januar 2005 komu ikki óvart á altjóða motorpressuna. General Motors eiga flestu partabrøvini í Suðurkoreansku verksmiðjuni, og fleiri londum eita Daewoo bilarnir longu nú Chevrolet
*Kelda: Motor Magasinet*

### Honda við fótgangara-airbag



Honda Motor Co. Ltd. gera nógv fyri at verja fótgangar í ferðsluni. Seinasta nýggja er, at teir hava gjørt ein motorhjálm sum "poppar-upp", um bilurin rakar ein fótgangara, ið verður slongdur upp á hjálmin, hetta fyri at verja høvdið
*Kelda: Motor Magasinet*